# Løgreglan bant um heilan fingur

**Seinnapartin leygardagin sá ein maður eina súkklu á botninum við Kongabrúnna og segði løgregluni frá, sum setti leiting í verk**

Løgreglan sendi seinnapartin leygardagin boð eftir kavarum frá Tórshavnar Sløkkiliði at kanna botnin framvið Kongabrúnni.

Ein maður, sum var farin í bátin, bar eyga við eina súkklu á botninum. Tá ið hann fiskaði hana upp, var talan um eina barnasúkklu, og hann sá eisini á henni, at hon var akkurát farin á sjógv, og tí boðaði hann løgregluni frá.

Løgreglan hevði ikki fingið boð um nakran, sum var saknaður, men fyri at binda um heilan fingur, fóru froskmenn at leita.

Men hóast teir leitaðu væl og leingi, funnu teir onki – uttan eina súkklu afturat, sum eisini akkurát var farin a sjógv og sum var í fínasta standi.

-aki-




*- Tað einasta, froskmenn funnu, var tíbetur enn ein súkkla*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*









## KIA cee'd

Hesin bilurin er eitt stórt koyriupplivilisi, allur sum hann er. Tú ivast, um tú situr í einum kvikum japanara ella í einum týskum GTI`ara. Heilt einastandandi koyrieginleikar. Eksklusivur komfortur og nógv pláss. Og ikki bara er hann ein prísbumba - hann er eisini ein garantibumba, tí Kia veitir 7 ára Garanti fyri Cee'd, nakað, sum higartil er óhoyrt í bilaheiminum. Kia Cee'd fæst nú eisini sum stationcar ella Sport Wagon.

**úr kr. 184.800**



**Kia Picanto úr kr. 124.800**



**Kia Magentis úr kr. 224.800**



**Kia Carnival úr kr. 334.800**



**Kia Rio úr kr. 159.800**



**Kia Carens úr kr. 256.800**



**Kia Sorento úr kr. 375.800**

## Kia – millum heimsins fremstu bilaframleiðarar

Kia Motors hevur bygt sína egnu bilverksmiðju í Evropa og floymir nú yvir evropeiska marknaðin við rúkandi ferð. Talan er um eina bilverksmiðju, sum hevur stórar ætlanir í Evropa. Verksmiðjan er ein tann mest framkomna í øllum heiminum, og í 2007 tóku teir allan bilaídnaðin á bóli við at geva heilt upp til 7-ára garanti upp á sínar bilar. Málsetningurin hjá Kia Motors er heilt greiður. Teir skulu verða millum heimsins størstu bilframleiðararnar.

BM **Berg Motors Sp/F · Staravegur 1-3 · FO-110 Tórshavn · tel 31 35 35 · www.bergmotors.fo**